# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI KVÍGGJARTÚN, ARGIR

SB_Argir_Kvíggjartún_2019_1_2023

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað sum sýnt er á viðfesta skjali 1, matr. nr. 56a, 56cl og 56ch Argir og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa byggingina í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í einum C3 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til miðstaendamál, skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Stk. 3. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast sum sýnt er á viðheftu skjølum 2 og 3.

Stk. 4. Sambært kap. IV, §22, stk. 2 skal útstykking og bygging í C3 øki gerast sambært serstakari byggisamtykt fyri alt økið ella ein natúrliga avmarkaðan part av tí.

Stk. 5. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKINUM

Økið verður býtt sundur í eindirnar A og B, samsvarandi skjølum 1, 2, og 3, og verða økini kannaði hesum endamálum:

Stk. 1. Øki A: Almennur stovnur

1. Økið verður lagt til almennan stovn.
2. Byggistigið má í mesta lagi vera 0,4.
3. Nýtslustiið má í mesta lagi vera 0,8.
4. Mest loyvda hædd á bygningi er 9 m frá planering.
5. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Øki B: Íbúðar- og miðstaðabygging

1. Økið verður lagt til íbúðar- og miðstaðabygging og felags hentleikar hjá íbúgvunum, felags øki, goymslurúm og tílíkt.
2. Byggjast skulu í mesta lagi 20 íbúðir.
3. Ein partur av veghæddini, skal vera til útvent miðstaðaendamál, t.e. handil, matstova, heilsubótarhøli og tílíkt. Hesin parturin er endin móti eysturi og minst 6 m inn í bygningin, sí prinsipp tekning á viðhefta skjali 3.
4. Virksemið skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
5. Byggistigið má í mesta lagi vera 0,4.
6. Nýtslustigið má í mesta lagi vera 0,8.
7. Byggjast skulu í mesta lagi 3 hæddir í vestara enda og 4 hæddir í eystara enda, sí prinsipp tekning á viðhefta skjali 3.
8. Mest loyvda hædd á bygningi er 15 m frá planering A og 12,5 m frá planering B, sí prinsipp tekning á viðhefta skjali 4.
9. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkering skulu gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1.500 | | | | |
| **Dagur** | 24.02.2023 | **Journal** | 22/05301 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 2, øki A, matr. nr. 56cl | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 23.02.2023 | **Journal** | 22/05301 | **Tekna** | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 3, øki B, matr. nr. 56, ch | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 23.02.2023 | **Journal** | 22/05301 | **Tekna** | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 4 | | | | |
| **Mát** | Ikki mátfast | | | | |
| **Dagur** | 22.02.2023 | **Journal** | 22/05301 | **Tekna** | |